FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Niður við Tjóðveldis-flokkinum!

**Høgni Hoydal**
*velevni tjóðveldisfloksins til fólkatingið*



Aðrir flokkar rópa nú: Niður við Tjóðveldis-flokkinum!

Lat okkum taka teir uppá orðið og senda Tjóðveldisflokkin niður á fólkating. Tá fáa allir føroyingar eina frælsa, føroyska rødd, ið vinnur tjóðini virðing.

Hinir stóru flokkarnir kappast nú um at leggja eftir Tjóðveldisflokkinum. »Rumbulsflokkur«. »Konfrontasjón«. Rópa teir.

Um tað er rumbul at standa við síni orð og sín rætt.

Um tað er rumbul, at halda avtalur.

Um tað er rumbul, at vera støðufastur og tala greitt.

Um tað er rumbul at hava stýrt búskapinum, so Føroyar í dag eru eitt betri og tryggari samfelag, enn nakrantíð áður.

Um tað er rumbul at fremja tað, sum aðrir flokkar hava lovað føroyingum.

Ja, so er Tjóðveldisflokkurin ein rumbulsflokkur. So er rumbul eitt orð fyri broyting og frælsi, meðan hinir flokkarnir renna undan sínum lyftum.

## Alt er gjørt sum avtalað

Fyri fýra árum síðani stóðu aðrir flokkar annars framman fyri Føroya fólki og lovaðu sjálvstýri og uppgerð við Danmark. Javnaðarflokkurin skuldi enntá draga danska forsætisráðharran fyri ein mannarættindardómstol. Og teir lovaðu eina íslendska loysn – har Føroyar skuldu gerast sjálvstøðugt land.

Tjóðveldisflokkurin tók teir uppá orðið. Vit hava ígjøgnum 4 ár fyrireikað og gjørt alt klárt til at fremja ta loysn, sum javnaðarflokkurin og fólkaflokkurin søgdu seg vilja fremja fyri 4 árum síðani.

Alt er greinað út í æsir – sáttmálin er klárur at skriva undir. Vit hava følt ein búskaparpolitikk, har vit bert hava brúkt ein triðing av blokkstuðlinum, men hava kortini raðfest fleiri pengar enn nakrantíð fyrr, til tey sum treingja mest. Júst sum vit lovaðu fyri 4 árum síðani.

Men danska stjórnin noktar at hava nakra virðiliga samráðing. Hon noktar at halda avtalur og at viðurkenna øll tey rættindi, sum hava verið fyrigyklað Føroya fólki í heimastýrinum.

## Kappbakka

Og hvat hendir? Nú bakka teir flokkar, ið hava rópt harðast. Nú er tað knaplliga Tjóðveldisflokkurin, sum er trupulleikin, tí hann heldur fast við okkara tjóðarrættindir og okkara sjálvsvirðing. Tí hann heldur fast við tað, sum avtalað er. Tí hann heldur fast um, at tað einasta virðiliga millum Føroyar og Danmark er javnbjóðis samstarv millum sjálvstøðu lond.

Hinir flokkarnir kappbakka. Men Tjóðveldisflokkurin sleppur ikki endanum. Hann heldur á, hóast avtalur verða brotnar. Eisini tí hann veit, at um ikki hildið verður fast, so rena aðrir flokkar skjótt landið á heysin aftur og so enda vit afturi í amtstíðini eftir eini løtu.

Tí er Tjóðveldisflokkurin trygdin fyri, at vit vinna á mál við støðufesti og greiðari talu. So kunnu fólk kalla tað rumbul, um tey vilja.

# Eitt virðiligt umboð á fólkating

**Annfinn Brekkstein**
*vælevni fólkafloksins*



Nú fólkatingsval er fyri framman, hevur Føroya fólk møguleikan at siga ja til ríkisfelagsskapin ella nei. Ein atkvøða til sambandsflokkin er eitt ja til ríkisfelagsskapin og harvið ja til framhaldandi samstarv við Danmark, sum vit hava samstarvað við í 600 ár. Eitt fólkatingsumboð hjá sambandsflokkinum fer framhaldandi at varðveita og menna vælferðarsamfelagið Føroyar innan karmarnar í ríkisfelagsskapinum. Eitt sambandsumboð á fólkatingi fer at arbeiða við at fáa heimastýrislógina dagførda soleiðis, at hon verður orðað við umhugsni bæði fyri tí menningini, sum hevur verið, síðan hon kom í gildið, og í samsvar við viðurskiftini, sum tey eru í dag.

Sum nýskipanaruppskotið hjá Sambandsflokkinum sigur: vit skulu greiða ríkisrættarligu viðurskiftini, har tey eru ógreið.

Eg eri ein av teimun, sum havi tað áskoðan, at vit alla tíðina hava ment okkum sum samfelag, tí vit eru í ríkisfelagskapi við Danmark.

Føroya Fólk vil framhaldandi varðveita vælferðarsamfelagið Føroyar, tað krevur at vit fáa umboðan á fólkating fyri framhaldani at menna samstarvið millum londini í ríkinum.

Vilt tú verða við at geva komandi ættarliðum fjølbroyttar møguleikar í altjóða høpi, so vel sambandsflokkin; hann gevur tær møguleikan.

# Ikki konfrontatión - men samstarv

**Jógvan Arge**
*velevni tjóðveldisfloksins til fólkatingið*



Summir flokkar føra seg fram sum teir einastu, ið duga at samstarva við danir, og vilja vera við, at ein atkvøða fyri Tjóðveldisflokkinum er ein atkvøða fyri konfrontatión við danir. Hetta er ikki rætt. Tjóðveldisflokkurin á danatingi fer at virka fyri samstarvi. Men hann fer at tala greiðari, enn eitt nú Fólkaflokkurin hevur gjørt.

At tala greitt merkir, at fólkatingsumboð ikki skulu leggja seg út í danskan innanríkispolitikk. At tey ikki skulu flyta føroyskar ósemjur upp á røðarapallin í fólkatinginum. Og at tey ikki skulu brúka tíðina til at keglast við hitt føroyska fólkatingsumboðið.

Hetta hava vit sæð alt ov mong dømi um seinastu fýra árini. Innanhýsis keglið á fólkatingi hevur staðfest danska fordómin um, at føroyingar vita ikki, hvat teir vilja. Men Tjóðveldisflokkurin veit, hvat hann vil. Hann vil fremja forstáilsi fyri sjálvsagda føroyska sjálvstýriskravinum við sakligari og siðiligari upplýsing.

Ein flokkur, sum førir fram, at føroyingar vilja hava staðfest síni tjóðarrættindi, at føroyingar eru ein sjálvstøðug tjóð, og at føroyingar eiga fullan rætt at stýra sínum egna landi, verður altíð ein flokkur, ið talar vegna alla tjóðina. Semja er um hesi viðurskifti í Føroyum. Og tí má boðskapurin út.

Tað liggur ongin konfrontatión í hesum. Tjóðveldisflokkurin ætlar hvørki í samanbrest við danir ella aðrar føroyskar flokkar á fólkatingi. Hann stríðist fyri at savna tjóðina og seta fram sjálvstýriskravið allastaðni. Uttan Tjóðveldisflokkin var ongin greið tala. Uttan hann var sjálvstýrismálið longu kódnað.

Tí er tað so umráðandi at velja tjóðveldisfólk á danating hesaferð. Tjóðveldisflokkurin víkir ikki frá síni stevnu, tá á stendur. Hann gruggar ikki boðskapin og gloymir at siga tað týdningarmesta, tá á stendur, tí hann er bundin av donskum flokkum.

Hann er tann frælsa røddin, ið best kann røkja føroysk áhugamál á fólkatingi.

X við E á valdegnum 20. november.

# Einki uttanumtos!

**Rani Nolsøe**
*fólkatingsvalevni Tjóðveldisflokksins*



Størsti trupulleikin vit hava at dragast við í Føroyum í dag er politiskur, ikki búskaparligur.

Fyrst í 90'unum var hann búskaparligur. Men eftir kreppuna er búskapurin komin fyri seg á einum nýggjum og haldbærum grundarlagi.

Fíggjarstýringin hjá sitandi landsstýri hevur á hesum búskaparliga grundarlagi vent tí vanliga undirskotinum í landskassanum til yvirskot.

Hóast hendan glottan seinastu fýra árini, er langt á mál, áðrenn vit kunnu siga, at vit politiskt eru komin eins langt eftir kreppuna, sum vit hóast alt eru búskaparliga.

Nøkur dømi um hetta finna í Javnaðarflokkinum.

Í februar í ár arbeiddi javnaðarflokkurin fyri, at tað almenna skuldi seta 25 milliónir í partapeningi í Smyril Line.

Í september ljóðaði av landsfundinum í Vestmanna, at skuldi flokkurin kunna halda síni vallyfti, var neyðugt at biðja um øktan blokkstuðul úr Danmark.

Fyrst í november avdúkaði ein av tingmonnunum hjá javnaðarflokkinum sína hugsan á vinnuliga økinum, við at skýra ta so avgjørt mennandi »avmonopoliseringina« av føroyska vinnulívinum - sum eitt nú avtøkan av telemonopolinum er eitt dømi um – fyri »sjónleik« og »tragikomik«.

Hesi dømi vísa, hvussu skjótt positiva tilgongdin kann fara fyri bakka. Hvussu skjótt vit aftur kunnu enda í almennum loftingarpolitikki, aftur í almennu monopoltíðini og í bindingini til danskar veitingar, um vit ikki varða okkum.

Nei, stóri trupulleikin í føroyska samfelagnum er ikki búskaparligur, sosialur ella mentannarligur.

Hann er framvegis politiskur og avgerandi er, at hann alla tíðina verður nørdur av spekulatiónum í donskum pengum.

Júst hesin politiskt-búskaparligi leiklutur, sum eitt nú javnaðarmenn lata donsku veitingarnar hava, ger tað alneyðugt at knýta ein greiðan politik í Føroyum saman umboðanina á fólkatingi.

Tí fer tjóðveldisflokkurin niður á fólkating uttanumtos: vælferðin í Føroyum skal byggja á einar sjálvberandi og samhaldsfastar Føroyar – og ikki á danskar pengar. Vit vilja samstarv, men á jøvnum føti.

Búskaparligi leikurin í talvinum er fluttur. Við tjóðveldisflokkinum taka vit eisini politiska leikin.

Uttanumtos verður tað sjálvbjargni og samhaldsfesti, sum byggir hetta land og skapar virðing altjóða - og har í millum í danska fólkatinginum.



FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Eitt fólkatingsval, eingin fólkaatkvøða

**Súsanna Dam**

Øll eru vit føroyingar, eisini sambandsfólk, hóast táttayrkjarin og speirekarin hava gjørt sítt ýtarsta til at avnokta at so er. Munurin er, at sambandsfólk hava givið sær meira far um tær givnu treytirnar - ikki bert tær fíggjarligu - men allar sum tær eru, til at hava latið seg tølt av nationalum rakstrarrópum og niðringsherferðum. Sambandsfólk hava duga at skilt millum linjurnar, at herrópini í stóran mun fjala útyvir eina sera stóra ómegd. Vit mugu ásanna, at hesi seinasta nærum fýra árini, er ein ógvusliga stórur partur av okkara skattapeningi nýttur ella rættari misnýttur heilt ábyrgdarleyst, og uttan at vit hava sæð nakað ítøkiligt úrslit. Aftaná nærum 4 árs arbeiði fyri ótaldar milliónir krónur hava vit ikki so frægt sum hoyrt eitt einasta orð um, hvørjar ætlanir politikarar hava, uttan tær, at teir skulu fáa evsta vald á »okkara vøkru fjøllum og ríka havi«. Einki av tí sum eyðkennir eitt nýmótans samfelag sær út til at vera fyrireika og enn minni klárt at seta í verk í nærmastu framtíð.

Teir skuldu skapa eina føroyska krónu, tí uttan eitt gjaldoyra verður eingin handil, uttan kanska fyri tey fáu, sum sita á útflutninginum. Teir skuldu gera avtalu við okkurt annað land um samstarv á økinum. Antin er hetta eitt sera loyniligt arbeiði, ella er als einki gjørt við tað, tí eg loyvi mær at gita at fjeppanin uppí íslendskum búskapi, hvørki kann ella eigur at verða tikin í álvara.

Teir skuldu hava eitt rættarverk at virka, men tíðin til at fyrireika hetta var alt ov stutt og arbeiði ov rúgvusmikið. Serkunnleikin á økinum hevur boðað frá, at ikki ber til at fullføra arbeiði innan tíðarfreistina; men hóast hetta hóttir Høgni Hoydal okkum við, at rættarverkið og politivaldið verða yvirtikin á nýggjárinum. Um hálvan annan mánaða!!!

Hóttanin, tí tað er sanniliga ein hóttan, ein hin allarstørsta móti tí tilveru og frælsi, sum flestu føroyingar ynskja sær, at vilja avtaka lóg og rætt, uttan at nakrar veit, hvat verður ístaðin. Hendan hóttanin er sett, hóast allar tær nýggjastu veljarakanningarnar vísa, at hann als ikki hevur meiriluta í fólkinum fyri sínum ætlanum.

Seinasta og einasta høvi vit fáa til at steðga slíkum óðamannaverki, er at nýta fólkatingsvalið, í staðin fyri lovaðu fólkaatkvøðuna um nýggja grundlóg, til so dyggiliga at vísa at vit á ongan hátt góðtaka nakra diktatoriska stýrisskipan. Tá rættarskipanin er yvirtikin verður ov seint.

Góðu veljarar farið tí fjølment á val og stuðlið Sambandsflokkin ella onkran av valevnunum. Vit hava altíð og fara altíð at verja rættartrygd hins einstaka.


Lesið Sosialurin -tað loysir seg


# Fyrsta uppstilling floksins til fólkatingsvalið

**Tordur Niclasen, Eiði**
**Anna Dam, Porkeri**
**Álvur Kirke, Kaldbak**
**Svein Askildsen, Havnin**
**Bjørg av Rana Nietchke, Tvøroyri**
**Bill Justinussen, Saltangará**
**Jenis av Rana, Havnin**
*Valevni Miðfloksins til Fólkatingsvalið*

Fullveldisspurningurin hevur megna at blinda eygu politikkaranna, so at samgongan ikki ger sær fær um hvussu mangir av borgarum okkara hava tað. Umráðandi er at politiski myndugleikin aftur fær sambandi við fólkið, vísir í verki umorgan fyri teim veiku, og torir at loyva fólkinum at tala í týðandi málum.

Eingin minkan av blokkinum eigur at verða framd fyrr enn fólkið hevur sagt sína hugsan.

Miðflokkurin byggir sín politikk á kristna lívs-og menniskjasýnið. Nú spurningurin um trúarfrælsi er vorðin miðdepilin í heimspolitikkinum, eru vit sannførd um, at neyðugt er meira enn nakrantíð áður at halda hesi virði frammi í politiska orðaskiftinum. Kristna lívshugsjónin er grundarlagið undir frælsu vesturlendsku samfeløgunum, og tí er tað ein náttúrligur partur av okkara politikki at ávirka, har tað stendur okkum í boðið. Tí vil ein møgulig Miðflokkarødd á fólkatingi ikki halda seg uttanfyri, men nýta eitthvørt høvi at peika á kristnu lívsvirðini, eisini í málum við beinleiðis ávirkan á danskan innanríkispolitikk.

Í sambandi við viðurskiftini millum Danmark og Føroyar harmast flokkurin um ta viðferð samgongan hevur givið føroyska fólkinum. Tað er bert fólkið, ið kann og eigur at sleppa at taka avgerðir í so týðandi málum. Tí var tað eitt beinleiðis lyftisbrot móti føroyingum, tá hesir ikki sluppu at siga sína hugsan á fólkaatkvøðuni, sum samgonguflokkarnir høvdu lovað, men sum teir allíkavæl ikki tordu at seta í verk!

Somuleiðis er tað undrunnar- og átaluvert at føroyingurin heldur ikki sleppur at siga sína hugsan um at blokkurin úr Danmark, sambært ætlan landsstýrsins, verður skorðin við 367 mió. kr.

Grundgevingar landsstýrsins er villleiðandi, tá hesir vísa á, at landskassin »svimur« í pengum. Hetta verður sagt, samstundis sum landsstýrið misrøkir og fremur stórar sparingar á t.d.:

- eldraøkinum
- stovnsplássum til menningartarnað og sálarliga sjúku
- skúlaøkinum viðv. stuðli til næmingar við serligum tørvi
- sjúkrahúsøkinum
- skúlalæknaøkinum
- og vit kundu hildi fram at víst á beinleiðis vanrøkt av týðandi samfelagsøkjum

Miðflokkurin fer framhaldandi at virka fyri at gomlu, sjúku og veiku samfelagsborgarar okkara fáa mannsømulig kor og at fólkið sjálvt fær møguleikan at avgerða viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.

Tað er ódemokratiskt og beinleiðis vandamikið, at ein fámentur politiskur meiriluti tekur so týðandi avgerðir uttan at spyrja ta fólk, ið her býr.


Fyrstur við tí seinasta
5 ferðir um vikuna




Ja!

**Sjálvandi vil eg halda Sosialin, fyri einans 400,- kr. ársfjóðringin og sparið 380,- í mun til leysasøluprísin.**

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Postnr.: ____________

Bygd/býur: ____________

Telefon nr: ____________

Undirskrift: ____________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn